TUNG PÍNUFULL RELIGIØS EK



LIST

Øssur Johannesen

Georges Rouault(1871-1958) telist millum teir stóru ekspressionistisku listamennirnar í 20 øld og hann er so avgjørt ein tann tungasti og daprasti av teimum øllum.

Hann var føddur í Paris og gekk seinni í listaskúla har, lærarin ætt Gustav Moreav sum eisini hevði m.a. Matisse og Albert Marquet sum næmingar.

Sum listamaður gekk Rouault sína egnu leið og ignoreraði øll mótarák innan listaheimin, hann avbyrgdi seg í sínum einsemi í atelierinum og málaði sínar myndir um sorgina og líðingarnar hjá menniskjanum, myndirnar eru ráar og kraftfullar og hava ein innari dynamik og substans í kemur úr innaru sálini og hjartanum hjá listamanninum og út á lørifti, tær eru tungar og depressivar helst tí listamaðurin sjálvur var tað og so festir hann seg við menniskjur sum livaog líða á skuggasíðuni í samfelagnum, hann málaði horur, klovnar og eisini fleiri kristus myndir við ektaðari og djúpari religiøsari kenslu, man merkir týðuliga at listamaðurin var religiøsur sjálvur.

Hansara bestu myndir eru intensar og sannførandi,tú merkir týðuliga at listamaðurin er sikkur uppá hvat hann vil hava fram, myndirnar eru sum oftast sera einfaldar og reinskornar, málað við tjúkkum svørtum og lidenskabeligum strokum, hann leggur høvuðsdentin á útrykki í myndini og síðani litirnar og ikki øvugt.

Hann hevur sítt serliga litaval sum er hansara egna nógv svart blátt og orangu ganga oftani aftur, mær dámar verri enn so allar hansara myndir og litirnir eru ikki altíð líka góðir, teir fáa ikki altíð rúm til at anda, viðhvørt sløkkir hann kraftina í litunum og aðra tíðir dámar mær slettis ikki hansara litir.

Rouault bleiv kendur og hevði góða undirtøku meðan hann livdi, Einaferð brendi hann fleiri hundrað málningar hann var ónøgdur við.

Ein sjálvsmynd frá 1925 hetta er ein sera einføld mynd, sum tær flestu eru hjá honum, hann hevur eina gráa húgvu á høvdinum pannan er høg, andliti lýsir í myrkrinum gollit og orangu við bláari melankolskari bakgrund.

Andliti er følsamt og dapurt hann er søkjandi og hyggur út í verðina. Eyguni eru svartir daprir skuggar, hann er einsamallur til í verðini sum øll onnur. Men innaní hesum dapra einsemi hevur hann kortini eitt trygt fundament sum hann kan standa á. Litirnir eru góðir í hesi mynd og kontrastin millum upplýsta andliti og skuggarnar í andlitinumog myrku bakrundina fungera væl.

Ein tann besta myndin sum Rouault málaði er av eini horu sum situr í sovikamarinum hjá sær og ger seg til reiðar framman fyri speglinum, vit síggja hennara slitna kropp, beinini við sokkunum, bróstini og reyvin og annan armin omanfyri høvdið, andliti er sera dapurt á at líta,